## So ymisk og tó á Zarepta

Aftur í ár verður familjulega fyri brekað vesturi á Zarepta. Legan er ætlað øllum teimum, sum bera brek, og familjum teirra. Legan byrjar hóskvøldið 17. apríl og endar sunnudagin 20. apríl. Yvirskriftin fyri leguna er: "so ymisk og tó..." Millum tiltøkini á leguni verða fleiri fyrilestrar um, hvussu tað er at liva við breki ella at vera avvarandi at fólki við breki. Harumframt verður tónleikur, fimleikur, ríðing , svimjing, andakt, sangur, spæl og ítriv.



## Langur fríggjadagur í SMS

Fríggjadagin 11. apríl hava handlarnir í SMS opið til kl. 23.00. Umframt hópin av tilboðum í ymsu handlunum, verður Lort í býin eisini á Torginum. Millum klokkan 17 til 21 verður Meyla stjóri í SMS, og tað verður stuttligt. Hon hevur nevnliga boðið dansigentunum og klovninum JoJo at hjálpa sær. Frá klokkan 17 og hvønn heilan tíma til klokkan 20 verður hon at síggja ymsastaðni i SMS. Hon fer at sita við kassan í Miklagarði, gera ísar í Horninum, servera burgarar í Burger King og kaffi í Baresso, og hon syngur og dansar í SMS. Eisini undirheldur klovnurin JoJo børnum og vaksnum.

# Taks fylgir ikki skattareglunum

**Taks noktar at endurrinda mvg, sum keyparar av nýggjum bilum hava goldið ov nógv. Hetta hóast hægsti skattamyndugleiki hevur sagt, at eingin heimild var at krevja peningin, sum tí skal afturrindast**



*Í seks ár hevur tað almenna kravt á leið 125 milliónir ov nógv inn í meirvirðisgjaldi frá borgarunum. Men hóast krøv eru góðkend frá hægsta fyrisitingarliga myndugleika, er ikki eitt oyra goldið út av hesum enn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

MVG

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað vóru fleiri bilaeigarar, sum raknaðu við, tá Skatta- og avgjaldskærunevndin á heysti 2006 gjørdi úrskurð um, at landið hevði kravt ov nógv í mvg av innfluttum bilum.

Onkrir av bilaánarunum gjørdu eisini av at krevja endurgjald fyri bil, sum varð keyptur í tíðarskeiðnum millum 1. mai 1999 og 28. apríl 2005.

Men hóast Skatta- og avgjaldskærunevndin longu hevði staðfest, at heimildin at krevja umrødda meirvirðisgjaldið inn ikki var til staðar, noktaði Taks at viðgera kravið. Ístaðin varð sagt, at Taks metir avgerðina hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini sum ivasama, og at stovnurin tí vil bíða, til Føroya Rættur hevur gjørt úrskurð í málinum.

### Harraboð til Taks

Borgarin, sum hevði sent kravið inn, vildi tó ikki lata sær lynda hetta svarið, men sendi málið víðari til Skatta- og avgjaldskærunevndina við kravi um, at Taks rindar ov nógv uppkravda meirvirðisgjaldið. Hetta undir tilvísing til málið, sum kærunevndin viðgjørdi á heysti 2006.

Og støðan hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini er púrasta greið.

- Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur tikið eina avgerð, og so leingi, sum henda ikki er broytt við dómi, er rættarstøðan, sum nevndin er komin til, galdandi. Taks má fylgja avgerðunum hjá nevndini og kann ikki nokta at viðgera umsóknir vísandi til, at tey eru ósamd við niðurstøðuna og hava lagt málið fyri annan rætt, verður sagt í niðurstøðuna hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini.

Nevndin krevur hartil, at Taks tekur málið til veruliga støðutakan, og vísir samstundis á, at Taks ikki kann nokta at viðgera umsókn vísandi til, at annað mál er lagt fyri Føroya Rætt.

Avgerðir hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini eru endaligar innan fyrisitingina.

## Spara 57.000 kr. um dagin

**Krøv um mvg-endurgjald fyrnast eftir fimm árum. Tí sparir tað almenna á leið 57.000 kr. fyri hvønn dag, sum gongur**

MVG

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá málið um ov nógv kravda meirvirðisgjaldið kom fram á heysti 2006, varð mett, at talan í alt snúi seg um 125 milliónir krónur, sum tað almenna hevði kravt ov nógv inn í tíðarskeiðnum frá 1. mai 1999 til 28. apríl 2005.

Hóast avgerð um málið varð tikin á heysti 2006, so hevur Taks enn ikki goldið nakað endurgjald sambært úrskurðinum. Stovnurin sigur seg vilja bíða eftir dómi úr Føroya Rætti, men tað hevur Taks ikki rætt til, verður nú staðfest av Skatta- og avgjaldsnevndini.

Einki er at ivast í, at fleiri borgarar spentir bíða eftir, hvønn úrskurð rætturin kemur til. Men fyri fleiri teirra loysir tað seg neyvan at bíða eftir hesum. Sambært løgfrøðingum, sum Sosialurin hevur tosað við, er talan nevnliga um mál, sum fyrna eftir fimm árum, og tí er nú avmarkað, hvussu nógvir keyparar kunnu krevja mvg-endurgjald frá landskassanum.

Fyrningarreglan merkir, at í dag eru tað bert krøv, sum eru nýggjari enn 10. apríl 2003, sum kunnu setast fram. Treytað av, at longu innsendu krøvini ikki eru alt ov nógv í tali, so merkir hetta, at av teimum upprunaligu 125 milliónunum, kunnu borgarar í dag bert krevja á leið tær 50. Hetta roknað út frá teirri fortreyt, at bilakeypið hevur verið javnt øll tey árini, sum løggávan var í gildi.

Og um so er, at borgarar bíða eftir, hvørja niðurstøðu rætturin kemur til, so loysir tað seg væl og virðiliga hjá Taks at dríggja hetta málið sum longst. Avleiðingin er nevnliga, at landið sparir á leið 57.000 kr. fyri hvønn dag, sum gongur, uttan at nýggj krøv verða sett fram.

## Tøgn á Taks

Vit ætlaðu at fáa viðmerkingar til málið um mvg-endurgjald fyri persónbilar frá Taks, men tað hevur ikki eydnast okkum.

Stjórin, Arnold Nielsen, er burturstaddur, og tað hevur ikki eydnast okkum at fáa viðmerking frá virkandi stjóranum, Hjørdis Gaard.

Vit ætlaðu annars at spyrja, hví Taks ikki hevur goldið pening út, tá avgerð hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini stðafestir kravið hjá borgaranum. Um Taks hevur kunnleika um, hvussu nógv krøv eru send inn um mvg-endurgjald. Um Taks fer at viðgera hesi krøv sambært seinasta úrskurðinum hjá Skatta- og avgjaldskærunevndini. Og um tað hevur áhuga hjá Taks at dríggja viðgerðina av rættarmálinum í Føroya Rætti, soleiðis at alt fleiri krøv fella fyri fyrningarfreistini.

**-mørk**

## Mistakið hekk í seks ár

Tá lógin um skrásetingargjald av nýggjum bilum varð dagførd tann 1. mai 1999 hevði ein villa sníkt seg við í lógartekstin.

Villan bar við sær, at tað almenna ikki longur hevði lógarheimild at krevja mvg av skrásetingargjaldinum av nýggjum bilum.

Mistakið varð ikki uppdagað fyrr enn seks ár seinni, og tann 28. apríl 2005 varð nýggj lóg samtykt, har hetta var rættað.

Villan merkti samstundis, at fólk, ið høvdu keypt nýggjan bil í tíðarskeiðnum, sum lógin var í gildi, høvdu goldið ov nógv í mvg, tá bilurin varð innfluttur. Ein borgari kærdi um hetta, men fekk ikki viðhald frá Toll- og Skattstovuni, sum stovnurin tá æt.

Málið varð kært til Skatta- og avgjaldskærunevndina, og tann 25. oktober 2006 gav nevndin kæraranum viðhald í málinum.

TAKS vildi tó ikki góðtaka úrskurðin, men gjørdi av at kæra henda til Føroya Rætt.

Enn hevur rætturin ikki gjørt úrskurð í málinum.

**-mørk**

### Fakta

1. mai 1999 vórðu dagføringar gjørdar í lógini um skrásetingargjald fyri innflutning av bilum.

28. apríl 2005 verður lógin broytt, soleiðis at heimildin at krevja inn ætlaða gjaldið verður í lagi.

25. oktober 2006 ger hjá Skatta og avgjaldskærunevndini úrskurð í kærumáli. Har verður staðfest, at tað ikki var lógarheimild at krevja inn millum 1 mai 1999 til 28 apríl 2005.

26 mars 2008 tekur Skatta- og avgjaldskærunevndin avgerð um, at avgerðin frá 25. oktober skal fylgjast, so leingi sum annar dómur ikki fyriliggur í málinum.

Skatta- og avgjaldskærunevndin er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki innan skatta- og avgjaldsøkið.